

# Ein framtíð í litum

## Føroyaprent søkir eftir trimum lærlingum

### ❶ Miðlagrafikaralærlingur



Miðlagrafikari er ein kreativ teknisk útbúgving, ið gevur møguleikar innan øll grafisk øki. Lærutíðin er 4 ár og byrjar við einum ári á tekniskum skúla í Danmark, har restin av skúlagongdini eisini fer fram. Lærlingalønin er sambært sáttmála millum Føroya Prentarafelag og Føroya Prentsmiðjufelag.

Vit hava brúk fyri einum ungum, skapandi fólki, ið dugir væl føroyskt, eins og vit eisini vænta, at tú hevur góðan kunnleika til teldur. Students-, HF ella HH-prógv er ein fyrimunur. Á Føroyaprent kemur tú at arbeiða við: Umbróting av bókum, prentlutum, avísum og bløðum, uppseting av lýsingum, skanningum, heimasíðusmíði, film og plátugerð og annars alt hugsandi grafiskt arbeiði.

### ❷ Prentaralærlingur

Prentari, ella trykkjari, er eitt spennandi arbeiði, har úrslitið av øllum tí grafiska arbeiðinum kemur á pappír. Útbúgvingin tekur 4 ár og øll skúlagongdin er í Danmark. Lærlingalønin er sambært sáttmála millum Føroya Prentarafelag og Føroya Prentsmiðjufelag.

Prentarar starvast við maskinum alla tíðina, og er tað tí umráðandi, at tú hevur hug at arbeiða við maskinum. Arbeiðið gongur skjótt, so tú mást duga at hugsa klárt tá avgerðir skulu takast. Á prentsmiðjuni er nógv trýst partar av árinum, og er tað tí neyðugt, at tú dugir at arbeiða undir trýsti. Hevur tú eina tekniska grundútbúgving er tað ein fyrimunur, men eingin treyt.

### ❸ Bókbindaralærlingur

Bókbindaraútbúgvingin ber danska heitið „Industri-bogbinder", og merkir hetta, at tað er innbinding av bókum í nógvum eintøkum. Útbúgvingin tekur 3 og eitt hálvt ár, og øll skúlagongd fer fram í Danmark. Lærlingalønin er sambært sáttmála millum Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna og Føroya Arbeiðsgevarafelag/Føroya Handverksmeistarafelag.



Bókbindari arbeiðir við nógvum maskinum, so tað er av alstórum týdningi, at tú trívist við at skrúva, men minst til, alt ið verður skrúvað av, skal skrúvast á aftur. Her eru stórar avbjóðingar fyri rætta persónin. Partar av árinum er nógv arbeiði á bókbindaríinum, so tú mást duga at arbeiða undir trýsti. Hevur tú eina tekniska grundútbúgving er tað ein fyrimunur, men eingin treyt.

### Felags fyri allar lærlingarnar er:

Vit hava brúk fyri ungum, ágrýtnum fólkum, ið hava lætt við at samstarva við arbeiðsfelagar og viðskiftafólk. Ung, ið skilja týdningin av at vera álítandi og at taka ábyrgd av egnum arbeiði, og sum skilja at bara tann besta góðskan kann góðtakast. Tað er neyðugt at lit-sjónin er í lagi.

Ferð og uppihald til skúlagongd í Danmark rindar Føroyaprent.

Vilt tú vita meira um útbúgvingarnar, kanst tú lesa meira á www.yrkisdepilin.fo ella www.grafiske-uddannelser.dk.

Vilt tú vita meira um størvini, kanst tú ringja til Føroyaprent og spyrja eftir Jon Hestoy.

**Umsóknarfreist 15. januar 2006**

*Skrivlig umsókn, við avriti av prógvum, skal sendast til:*

Pf. Føroyaprent
Postsmoga 3118
110 Tórshavn

Hoyviksvegur 59 · Postsmoga 3118 · 110 Tórshavn
Tel. 31 45 55 · fax 31 80 26 · hestoy@foroyaprent.fo

Føroyaprent


Havnar Bio

kall Coca-Cola




Stolthed & fordom

| | | | |
|---|---|---|---|
| Týsdag | 10.01 | kl. 19.30 | kl. 22.15 |
| Mikudag | 11.01 | kl. 19.30 | kl. 22.15 |
| Hósdag | 12.01 | kl. 19.30 | kl. 22.15 |




Narnia

| | | | |
|---|---|---|---|
| Týsdag | 10.01 | kl. 18.30 | |
| Mikudag | 11.01 | kl. 18.30 | |
| Hósdag | 12.01 | kl. 18.30 | |




King Kong

| | | | |
|---|---|---|---|
| Týsdag | 10.01 | kl. 21.30 | |
| Mikudag | 11.01 | kl. 21.30 | |
| Hósdag | 12.01 | kl. 21.30 | |

KOMANDI FILMUR:




Jarhed FRUMSÝNING

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 13.01 | kl. 21.00 | kl. 23.30 |

www.bio.fo • Telefon 31 19 56

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu